# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# LATIÐ TINGSKIPANINA FÁA FRIÐ

Á tingborð kemur nú enn eitt uppskot um broytingar í tingskipanini. Grundgevingin er millum annað, at vit skulu hava eina *»effektivari og minni rúgvusmikla politiska skipan, har arbeiðið á Løgtingi fer at verða lyft á eitt hægri støði«* - og at eitt løgting við 25 tingfólkum fer at verða bíligari at reka.

Tað er Bjørn Kalsø úr Sambandsflokkinum, sum er stigtakari til uppskotið, og hann ætlar at fáa fólk úr øðrum flokkum at hjálpa sær. Hann vónar eisini, at hesin hugburður hansara skal seyra ígjøgnum alla ta almennu skipanina, so vit fáa eina effektivari og bíligari umsiting.

Tað er ikki sørt ørkymlandi, at so nógv uppskot um broytingar í tingskipani verða nærmast tveit fram á tingborð. Fleiri teirra so illa umhugsað og undirbygd, at tú fært ikki teg ikki at trúgva góðu intentiónunum, sum verða brúktar sum undanførslur.

Tað ljóðar helst sum søtur musikkur hjá mongum, at alt skal verða bíligari og effektivari - men ber tað nú til at effektivisera fólkaræði á hendan hátt? Um tað er bíligari og effektivari við 25, so verður tað uppaftur bíligari og effektivari við 15 ella 12 ella 9...

Løgtingið hevur samtykt at endavenda øllum spurninginum um valskipanina, og herundir vælsaktans eisini spurninginum um, hvussu nógv fólk skulu manna tingið. Javnstøðuspurningurin hevur verið nógv frammi seinnu árini, og hann eigur at verða tungtvigandi í hesum kjakinum.

Men løgmaður og formaður Sambandsfloksins bakkar Bjørn Kalsø upp. Hann segði við Sosialin fyrr í summar, at tingmannatalið eigur at verða lækkað til 23! *»Álvaratos altso, er tað neyðugt at hava 33 tinglimir at stýra Føroyum«*, spurdi løgmaður, sum eisini heldur, at tað er eitt betri uppskot at lækka tingfólkatalið enn at lækka tingløninirnar.

Tá slík uppskot, sum hetta, koma fram, so virkar tað sum um, at onkur vil velja onkran frá. Tað var væl skiljandi, at Gerhard Lognberg, sum útjaðarapolitikari rópar varskó, tí



hvussu skal útjaðarin fáa frægari umboðan á henda hátt? Og hvussu við javnstøðuni? Er veruliga nøkur matematisk hugsan aftanfyri, tá tingmannatalið skal skerjast til 25 ella 23?

Vit halda tað ikki verða rætt at broyta hesi viðurskifti í tíð og ótíð - og vit ivast stórliga í, um tað skulu verða tingfólk, sum taka slíkar avgerðir. Í minsta lagi áttu tað at verið tvey løgting við einum vali ímillum, sum tóku slíkar avgerðir.

Latið nú tingskipanina hava frið, meðan hon verður endurskoðað. Um tingfólk meina nakað við tað, at løgtingið skal vera bíligari at reka, so er bara at ganga sum fyrimyndir og repa sínar egnu lønir.

**» Ikki rætt at broyta tingskipan í tíð og ótíð**

## Public service av Finni Fríða




*»Og Ingolf S. Olsen, sum gjørdi innslagið, er sjálvur við Finni Fríða...«*

Soleiðis endaði eitt av innsløgunum í Degi og Viku fríggjakvøldið.

Uttan at leggja okkum út í, hvør hevur rætt í trætumálunum um, hvørt skip, sum veiða makrel, hava loyvi at pumpa frá hvørjum øðrum, so virkar tað illgrunasamt, at eitt reiðarí hevur sín egnan tíðindamann í almenna public service sjónvarpi okkara.

Men tað hevur reiðaríið Varðin í Gøtu - sambært Degi og Viku fríggjakvøldið, har mynstraði tíðindamaðurin dementeraði onkrar skuldsetingar móti reiðarínum.

Journalistikkur snýr seg um trúvirði, um integritet - ja, hyggjarin skal ikki freistast til at ivast í, hvørjum harra tíðindamaðurin tænir.

Her haltaði álvarsliga hjá Ingolfi og Kringvarpinum.

*»Og Ingolf S. Olsen, sum gjørdi innslagið, er sjálvur við Finni Fríða...«*

## Kim syngur sálmar til aftankvirru



Komandi fríggjakvøld verður aftur aftankvirra í Havnar kirkju.

Tað eru fýra ár síðani, at farið varð undir hetta tiltak, og undirtøkan hevur verið góð.

Formurin er einki broyttur. Kirkjan er opin frá klokkan 21 – 23 fyrsta fríggjakvøld í hvørjum mánaði.

Millum klokkan 21 – 22 er høvi hjá fólki at sita í friði og náðum. Eingin spyr, hvussu tey brúka løtuna.

Klokkan 22 er tónleikur ella sangur á skránni og klokkan 22.30 er andakt.

Nú fríggjakvøldið syngur Kim Hansen sálmar og Marius Rein hevur stutta andakt.



**» Feðgar við Kafka**

TÍÐINDI Á SÍÐU 28



**» Við kamping í 50 londum**

BILAR Á SÍÐU 46-47

## Lærarar í málsligari fáfongd

Tað tykist marghháttigt, at Móðurmálslærarafelagið er ímóti málsligum fjølbroytni í miðlum. Men tað sigur Vár í Ólavstovu, forkvinna í Móðurmálslærarafelagnum.

Tað var í tíðindunum hóskvøldið, at Kringvarpið tók upp spurningin, hvørt tíðindafólk í útvarpinum skulu sleppa at nýta sína egnu dialekt, tá tey lesa tíðindi.



*Ívar Iversen, útvarpsmaður, var kendur fyri sín vakra málburð*

Fólk eru eftir øllum at døma ikki samd um hetta. Víst so hevur onkur tíðindamaður brúkt sína dialekt í so ramliga og so yvirdrivið, at tað troyttar fólk, men tað kann ikki passa, at Móðurmálslærarafelagið vil standardisera dialektirnar úr útvarpsmálinum. Tá hava vit mist nógv, og tá eru lærararnir alt ov trongskygdir.

Í Føroyum eru vit í tí hepnu støðu, at vit hava varðveitt málsligu brigdini í málinum - ja tú kanst næstan kenna munin frá bygd til bygd, og tað er ein málsligur skattur at eiga. At tosa um, at danskt hóttir, og at tað hevur størri týdning at stríðast móti danska hóttan enn at varðveita dialektirnar, tað er fjas.

So góðu bygdafólk í Kringvarpinum og miðlunum annars: Tosið við tykkara egnu dialekt - lurtið heldur eftir fróðarmanninum í Kirkjubø, Orðabókini.

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo
**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo
**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814, aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo
***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*